# »Eg skrivi 7« komin út

**Sjeynda bókin í »Eg skrivi« røðini er nú komin út. Hon er tann sjeynda bókin í eini røð av rættskrivingar- og málláruheftum til miðdeild fólkaskúlans, og ætlanin er at tað skulu verða níggju bøkur tilsamans**




BÓKAÚTGÁVA
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Føroya Skúlabókagrunnur boðar í tíðindaskrivi frá, at sjeynda bókin í »Eg skrivi« røðini nú er komin út.

Endamálið við »Eg skrivi« bókunum er at stuðla og eggja næmingunum at kunna seg væl og virðiliga um tað føroyska málið, her undir føroyska málláru og rættskriving, so at næmingunum fellur lætt og raðið at orðbera seg á góðum og tíðarbærum føroyskum máli, bæði í talu og skrift.

»Eg skrivi-bøkurnar« eru ikki ætlaðar ávísum floksstigi, men kunnu vegleiðandi nýtast úr 5. flokki ella seint í 4. flokki, og upp í 7. flokk ella 8. flokk, so sum lærari heldur tað vera hóskandi.

Málláran í »Eg skrivi 7« byggir á tað, sum næmingarnir hava lært í teimum fyrru bókunum.

Tað er Gunnvá Dam, ið hevur skrivað bókina, og Edward Fuglø hevur prýtt við myndum. Umbróting, repro og prent hava Vasti og Estra staðið fyri.

»Eg skrivi 7« fæst til keyps á Bókamiðsøluni, og saman við hefti til útfyllingarfyrisagnir kostar hon 98,- krónur.



# Fíggjarleiðari

Føroya størsta grafiska virki søkir eftir fíggjarleiðara. Føroyaprent er eitt virki í menning og tað er av alstórum týdningi, at góð fíggjarleiðsla er ein partur av hesari menning. Fíggjarleiðarin virkar við tilvísing til stjóran og í okkara leiðslubólki.

**Vit hugsa okkum, at tú**
- hevur eina viðkomandi útbúgving
- royndir innan fíggjar- og roknskaparøkið
- evni at raðfesta og leggja arbeiðið til rættis
- góð samstarvsevni
- hevur áræði, ert álítandi og dugir at arbeiða sjálvstøðugt

**Ábyrgdarøki**
- At gera fíggjarætlanir og roknskap, herundir fíggjarstýring og uppfylging.
- At menna mannagongdir á fíggjarøkinum
- At hava ábyrgd av bókhaldinum
- At hava eftirlit við rakstrinum
- At fáa til vega uppgerðir og hagtøl
- At hava ábyrgd av vanligari umsiting

**Arbeiðsviðurskifti**
- Løn og setanartreytir eftir avtalu.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Vilt tú vita meira, so ring til Jon Hestoy, stjóra, á telefon 59 45 55.

Umsóknarfreist
15. september 2008.

Skrivlig umsókn við CV verður at senda til:
Pf. Føroyaprent
att.: Jon Hestoy
Postsmoga 3118
110 Tórshavn
hestoy@foroyaprent.fo

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI 541 705

Føroyaprent
Hoyvíksvegur 59 · Postsmoga 3118 · 110 Tórshavn
Tel. 31 45 55 · fax 31 80 26 · hestoy@foroyaprent.fo



# Sámal Tróndur settur sum Landsskjalavørður

**Mentamálaráðið hevur sett Sámal Trónd Finnsson Johansen í starvið sum landsskjalavørður. Hann var landsskjalavørður frá 2003-08. Síðani 1. jaunar hevur hann verið virkandi landsskjalavørður**

LANDSSKJALAVN
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Sámal Tróndur Finnsson Johansen er 42 ára gamal og útbúgvin cand. scient. soc. við sergrein í søgu og geografi frá Roskilde Universitetscenter.

Síðst í nítiárunum var hann granskari á verkætlanini ”Føroyar í kalda krígnum”.

Sámal Tróndur Finnsson Johansen er limur í ritstjórnini fyri Frøði og limur í stýrisbólkinum fyri ”Circum Polar Arctic Social Science PhD Course”, sum er samstarv millum universitet og aðrar granskingarstovnar í Ruslandi, Danmark, Svøríki, Noregi, Finnlandi, Íslandi, Grønlandi, Kanada, USA og Føroyum.

Í 2004-2005 var hann leiðari av útnorðurverkætlanini ”FIHA-Vestnorden”, eitt samstarv millum skjalasøvnini í Føroyum, Íslandi og Grønlandi, sum hevði til endamáls at seta í verk eina felags strategi fyri varðveiting av vinnulívssøvnum í Útnorði.

Hann byrjaði á Landsskjalasavninum sum frítíðaravloysari í 1990 og starvaðist sum savnsvørður á Landsskjalasavninum í tíðarskeiðnum 1999-2002. Frá 2003-2008 var hann settur í áramálssett starv sum landsskjalavørður.